# Føroyingar til arbeiðis í Hetlandi

**-Hetland skal brúka umleið 1000 arbeiðsfólk í sambandi við eina risastóra gassútbygging, og her hava eisini føroyingar møguleika at bjóða seg fram sigur Johan Dahl, landsstýrismaður eftir fund við hetlendska løgmannin.**

Jan Müller

Eftir ein langan túr úr Hetlandi umvegis Aberdeen og Keypmannahavn komu hetlendski løgmaðurin og varaløgmaðurin seint týskvøldið til Føroya. Endamálið við ferðini er at menna samvinnuna millum Hetland og Føroyar.

– Tað hevur verið ein sera áhugaverdur fundur, har vit hava kunnað hetlendingar um vinnulig viðurskifti í Føroyum, hvat fer at henda á landgrunninum í summar, hvørjar ætlanir vit hava í sambandi við orku og elveiting framyvir oma. Vit hava eisini fingið kunning um teirra spennandi ætlanir viðvíkjandi vindmylnupark og at leggja elkaðal til meginlandið. Vit hava tosað um møguleikar innan inovatión og íverksetan og ikki minst um varandi orkumøguleikar greiðir Johan Dahl frá eftir fund við hetlendsku sendinevndina.

– Eg og Annika Olsen ætla okkum at fara til Hetlands og Skotlands í mai fyri at síggja við egnum eygum, hvat tey har arbeiða við í sambandi við varandi orkukeldur sigur landsstýrismaðurin.

### Føroyingar til Hetlands!

Tey vórðu eisini kunnað um stóru gassútbyggingina í Sullom Voe, har tað skulu brúkast umleið 1000 fólk til arbeiðið.

– Vit hava víst á, at vit eiga mong góð fólk í Føroyum, sum kundu verið við til tað arbeiðið, um tørvur er á tí. Teir føroyingar, sum hava áhuga fyri hesum, kunnu venda sær til Vinnumálastýrið ella til myndugleikarnar í Hetlandi, hvussu teir kunnu gerast partur av hesi stóru verkætlan.

Johan Dahl vísir á, at møguleikarnir fyri at menna samvinnuna við Hetland spretta m.a. úr tí slóðbrótandi arbeiði, sum Føroya Tele hevur gjørt í Hetlandi í sambandi við kolvetnisútbyggingarnar til havs og á landi.

Hetlendingar eru áhugaðir at fáa Føroya Tele til at gera fleiri uppgávur í Hetlandi eitt nú í sambandi við breiðband. Hetta er gott fyri Føroya Tele og fyri Hetland heldur landsstýrismaðurin.

Eisini innan byggi- og anleggsarbeiði eru møguleikar hjá føroyskum fyritøkum. –Eg ivist ikki í, at Articon og onnur føroysk feløg kundu havt ágóða av at farið inn í menningarvirksemi í Hetlandi.



*Johan Dahl, vinnumálaráðharri saman við hetlendska løgmanninum, Sandy Cluness eftir fund um samvinnu*

Mynd Jan Müller

Johan Dahl sær, eftir fundin við hetlendska løgmannin, eisini stórar møguleikar í eini samvinnu á oljuøkinum millum Føroyar og Hetland.

### Orka

Eisini løgmaðurin í Hetlandi var bjartskygdur eftir fundin við Johan Dahl og sigur, at teir síggja fram til samstarv. Her ikki minst við Føroya Tele, sum kann vera við til at veita hetlendingum breiðband. – Vit síggja eisini fram til samstarv á orkuøkinum við varandi orkukeldum. Í framtíðini fer oljuprísurin at vera so høgur, at hvørki Hetland ella Føroyar megna at fylgja við uttan at gera brúk av øðrum orkukeldum. Vit halda at okkara royndir eisini kunnu koma føroyingum til góðar og vísir á, at tað átti at borið til at lagt orkukaðal úr Føroyum til Hetlands og víðari inn á skotska meginlandið.

Johan Dahl sigur, at ferðasambandið er sjálvandi ein stórur trupulleiki fyri at menna samvinnuna. – Hetlendingar ætla sjálvir at taka upp spurningin við flogferðsluni og vita, hvat kann gerast frá teirra síðu fyri at fáa flogsamband aftur millum Føroyar og Hetland ella Skotland.

Men ferðasambandið hevur eisini alstóran týdning fyri Cluness løgmann: –Tað sigur ikki so lítið, at vit fóru úr Hetlandi klokkan átta á morgni, og tá klokkan var átta á kvøldið vórðu vit framvegis uppi yvir Hetlandi ávegis til Føroya.

Samskifti er altavgerandi fyri samvinnu millum lond og har er flutningur av stórum týdningi, so vit síggja fram til loftvegis samband í framtíðini og vónandi eisini sjóvegis samband.

*Veitst tú eina søgu, send so SMS á 28 50 04*



*Frá fundinum í Tinganesi millum Johan Dahl og hetlendsku sendinevndina*

Mynd Jan Müller